Hanna D. Andreassen

Fra: Katrin Mørkøre <katrinm@redcross.fo>
Sendt: Tuesday, October 31, 2023 21:10
Til: Hanna D. Andreassen; Elsa Østergaard; Helena Dam á Neystabø
Cc: Sigrið Zachariasen; Katrin Dalsgaard Nolsøe
Emne: SV: Uppskot til løgtingslóg um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál til hoyringar - Hoyringarfreist 31. oktober 2023

Góðu tit

Reyði Krossur hevur hesar viðmerkingarnar til løgtingslóg um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál:

Lógaruppskotið leggur upp til, at nýggj skeið byrja tvær ferðir um árið. Soleiðis skilja vit tað, tá tvær lestrarhálvur verða umrøddar. Hetta førir við sær, at tilflytarar og flóttafólk kunnu koma at bíða upp í hálvt ár eftir at fáa undirvísing í føroyskum. Tað hevði verið ynskiligt, at tilflytarar fáa møguleika at byrja á málskeiði skjótt eftir komu til landið, tað kundi verið skipað, so fleiri skeið eru um árið (og kanska styttri).

Tað er ein trupulleiki, at tilflytarar ikki fáa fíggjarligan stuðul, meðan tey ganga til undirvísing í føroyskum sum annaðmál. Tað hevur í summum førum við sær, at tey noyðast at arbeiða og tí ikki hava tíð ella møguleika til at fara til undirvísing.

Í summum førum hevði tað verið ein fyrimunur, um undirvísingin var skipað sum fulltíðarundirvísing í styttri tíðarskeið heldur enn hálvtíðarundirvísing í longri tíðarskeið. Hetta er serliga galdandi, um eingin lestrarstuðul verður givin.

Tá lógaruppskotið leggur upp til, at málskúlin verður skipaður í eindum, kann væntast at nógv lesandi fáa útreiðslur av at ferðast ímillum bústað og skúla. Ynskiligt er tí, at ferðastuðul verður tryggjaður næmingunum. Tað hevur eisini týdning, at lokalu málskúlarnir eru lætt atkomiligir fyri øll, t.v.s, at buss- og ferjusamband er tøkt.

Vinarlig heilsan

Katrin Dalsgaard Nolsøe og Katrin Mørkøre

Katrin Mørkøre
Samskipari í Móttøkuhúsinum / Reception Center Coordinator
Email: katrinm@redcross.fo | Tel: +298 28 66 37
Reyði Krossur Føroya

Fra: Hanna D. Andreassen <hanna@bumr.fo>
Sendt: 10. oktober 2023 13:11
Til: Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; Løgmálaráðið <lmr@lmr.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Info útlendingastovan <info@utlendingastovan.fo>; industry@industry.fo; samtak@samtak.fo; staravsfelag@starvsfelag.fo; lararaf@lararafelag.fo; Føroya Pedagogfelag <pedagog@pedagogfelag.fo>; Undirvísing <undirvising@uvs.fo>; Nám <nam@nam.fo>; setur@setur.fo; kf@kf.fo; Reyði Krossur Føroya <redcross@redcross.fo>; kvoldskulin@torshavn.fo; kvungskuli@tvoroyri.fo

Cc: Elsa Østergaard <elsao@bumr.fo>; Helena Dam á Neystabø <HelenaN@bumr.fo>
Emne: Uppskot til løgtingslóg um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál til hoyringar - Hoyringarfreist 31. oktober 2023
Prioritet: Høj

Góðu tit

Viðfest er uppskot til løgtingslóg um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál.

Orsøkin til, at lógaruppskotið verður lagt fram, er, at tørvur er á at skipa ein fakligan, námsfrøðiligan og løgfrøðiligan karm fyri undirvísing í føroyskum máli, mentan og samfelagviðurskiftumfyri borgarum í Føroyum, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál.

Umráðandi er, at hetta lógarverk tryggjar samstarv við kommunurnar, og at samstarvið byggir á tað samstarv, sum hevur verið millum partarnar innan karmarnar á lóg um frítíðarundirvísing. Ein lógarkarmur, sum er fleksibul og skjótt kann laga undirvísingartilboðini til tørvin hjá borgarum og til ta til eina og hvørja tíð galdandi námsætlan, eins og til tann staðbundna tørvin.

Hoyringarfreistin er **31. oktober 2023.**

Barna- og útbúgvingarmálaráðið skipar fyri kunnandi fundi um uppskotið miðskeiðis í hoyringartíðini, nærri kunning um hetta verður send út seinni.

Eru spurnignar, ber til at venda sær til Elsu Østergaard á tlf. 555004 ella Helenu Dam á Neystabø, tlf.555022.

Hoyringarpartar / FSA:

- *Kvøldskúlar, sum undirvísa í Føroyskum sum annaðmál*
- *Øll aðalráð*
- *Útlendingastovan*
- *Vinnuhúsinum*
- *Samtak*
- *Starvsfelagið*
- *Føroya Lærarafelag*
- *Pedagogfelagnum*
- *UVS*
- *NÁM*
- *Fróðskaparsetri*
- *Føroya Kommunufelag*
- *Reyði Krossur*

NB! Heitt verður vinarliga á Kommunufelagið um at víðarisenda henda teldupost til viðkomandi kvøldskúlar, sum undirvísa í føroyskum sum annaðmál.

Vinarliga / Kind regards

Hanna D. Andreassen
Stjórnarskrivari / Personal Secretary

Office: +298 306500
Mobile: +298 555060
Mail: hanna@bumr.fo

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Children and Education

J. H. Schrøtersgøta 7
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

www.bumr.fo